


# Túrfrágreiðing

## Úrslit frá yvirlitstrolingini á Føroyabanka

## 8.– 15. september 2004

*Cruise report: Results from the groundfish trawl survey on Faroe Bank*

*8-15 September 2004*

Eyðfinn Magnussen



NVD*Rit* 2004:13

NÁTTÚRUVÍSINDADEILDIN FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Faculty of Science and Technology University of the Faroe Islands

*Heiti / Title* ***Úrslit frá yvirlitstrolingini á Føroyabanka***

**8.- 15. september 2004**

*Results from the groundfish trawl survey on Faroe Bank*
*8-15th September 2004*

Høvundur / Author **Eyðfinn Magnussen**

Ritslag / Report Type Tøknifrágreiðing/Technical Report

***NVD*Rit** 2004:13
© Náttúruvísindadeildin og høvundurin

Útgevari / Publisher Náttúruvísindadeildin, Fróðskaparsetur Føroya
Bústaður / Address Nóatún 3, FO 100 Tórshavn, Føroyar (Faroe Islands)
Postrúm / P.O. box 2109, FO 165 Argir, Føroyar (Faroe Islands)
☎ • 🖷 • @ +298 352550 • +298 352551 • nvd@setur.fo

# Samandráttur av úrslitunum

**Fiskurin á Bankanum feitari**
Fiskurin á bankanum er blivin feitari. Síðani ár 2000 er toskurin á Bankanum vorðin alsamt meira rak. Hesi árini er toskurin blivin 15 % klænri. Helst er tað minkandi føði, sum hevur verið atvoldin til hetta. Men nú sær út til at vend er komin í. Toskur, hýsa og upsi eru millum 3 og 5 % feitari nú, enn fyri einum ári síðani. Hetta vísa nýggjastu kanningarnar, sum fólk frá Fróðskaparsetrinum og Fiskirannsóknarstovuni gjørdu við Magnusi Heinasyni á Føroyabanka dagarnar 10. til 14. september 2004.

**Minni til og smærri fiskur**
Kanningarnar vísa eisini, at miðalveiðan av toski, hýsu og upsa er minkað munandi. Toskaveiðan er minkað við 55% í mun til í fjør. Fyri hýsu er minkingin 20 % og fyri upsan 33 %. Tað er ikki bert minni til av fiski á bankanum. Fiskurin er eisini smærri. Helvtin av toskinum var minni enn 68 cm. Hetta er væl minni enn miðskeiðis í 90-árunum, tá miðallongdin á toski var millum 85 og 90 cm. Nú er einans 4 % av toskinum størri enn 90 cm. Tað er óivað tað stóra veiðitrýstið á bankanum, sum ger, at toskurin, ikki longur hevur møguleika at vaksa seg stóran.Eisini upsin var smáfallandi. Helvtin av upsanum var minni enn 52 cm til longdar. Hetta er 4 og 5 ára gamal upsi. Hetta er sama upsastøddin, sum var fingin í 2003. Miðallongdin á hýsuni var 45 cm. Hetta er 3 og 4 ára gomul hýsa.

**Hitin á Bankanum lækkar nú aftur**
Mátingar av sjónum við botnin vísa, at sjógvurin á Føroyabanka er eitt sindur kaldari nú enn fyri einum ári síðani. Síðani 1999 er hitin støðugt vaksin frá 10,44°C til at vera 11,24°C í 2003. Miðalhitin hendan túrin var 10,95 °C. Hetta er 0,29 °C kaldari enn somu tíð í fjør.

**Fólk við frá FRS:** Arnold Henriksen, Luis Cruz og Marit Pedersen.
**Fólk við frá Fróðskaparsetrinum:** Eyðfinn Magnussen.

**Ábyrgd:** Eyðfinn Magnussen, Fróðskaparsetur Føroya.

**Endamál:** Hetta var triði og seinasti túrurin av heyst-yvirlitstrolingunum. Høvuðsendamálið við túrinum var at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu sløgum. Umframt skuldi vekt, tal og longdarbýti skrásetast fyri øll fiskasløg, ið vórðu veidd. Eisini vóru magakanningar gjørdar av toski, hýsu, upsa.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum og við vanligum grunni. Breidlarnir vóru 60 m og 120 m, Steinhamns lemmar, Minilog hita- og dýpdarmátari, Sea-Bird CTD og WP2 glúpur.

**Um túrin:** Farið varð av Havnini 9. september kl. 21.05. Fyrsta CTD-støðin varð tikin 10. september kl. 04.05. Seinasta støðin varð tikin 14. september kl. 16.10. Alla støðir vórðu tiknar. Í sýnishondbókini verður miðað eftir at taka 1200 nytrur av toski, hýsu og upsa; 400 av hvørjum. Av tí at ov lítið var at fáa, var hetta bert møguligt fyri hýsu. Av toski vórðu tiknar 372 nytrar og av upsa 193 nytrar.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Magarnir vórðu sorteraðir umborð og eru lagdir inn í databasuna. Mátingarnar frá hitamátaranum á trolinum eru upparbeiddar. Úrslitini frá Imponatorskipanini eru rættlisin og nytrurnar lisnar. Øll úrslitini eru klár og verða víst í hesi frágreiðingini.

**Úrslit frá túrinum:**

Hiti: Á *mynd 1* er miðalhitin við botnin vístur fyri hvørt tov. Hitin hendan túrin var millum 5,98 og 11,54 °C. Á myndini sæst, at sjógvurin var heitastur inni á Bankanum og kólnaði so út móti kantinum. Hesin hitamunur kemst av, at tann grunni sjógvurin inni á Bankanum um summarið verður hitaður frá í erva av sólini og av tí, at luftin um summarið er heitari enn sjógvurin. Um veturin og tíðliga um várið er tað øvugt; tá er tann grunni sjógvurin kaldastur. Á *mynd 2* er vístur miðalhitin niðri við botnin um heystið árini 1997 til 2004. Miðalhitin hendan túrin var 10,95 °C. Hetta er eitt sindur lægri enn fyri einum ári síðani, tá miðalhitin var 11,24 °C. Árið 2003 var samstundis tað heitasta í tíðarskeiðinum 1999 til 2003, tá sjógvurin á Føroyabanka gjørdist alsamt heitari. Miðalhitin hesi árini hækkaði frá 10,44 °C í 1999 til 11,24 °C í 2003. Fyribils sær nú út til, at hesin vøksturin er steðgaður.

Á *mynd 2* er eisini víst standardfrávikið í mátingunum. Av tí at y-aksin á myndini er stuttur, sær tað út sum um frávikini eru stór. Hetta er tó ikki so. Variatiónskoefficienturin hevur í áðurnevnda tíðarskeiði bert verið millum 3 og 5%.




***Mynd 1****: Miðalhitin við botnin á Føroyabanka 10.-14. september 2004. Hitin er miðalvirðið fyri hvørt tov.*




***Mynd 2****: Miðalhitin ± standardfrávik (S) við botnin á Føroyabanka um várið (heila linjan) og heystið (brotna linjan) árini 1997-2004. Bert mátingar grynri enn 150 m eru tiknar við.*

| Fiskaslag | Samlað veiða (kg) | | Tal av prøvum | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | 2003 | 2004 | Longdar mátað | Stak vektir | Nytrur | Magar |
| HÝSA | 13.967 | 12.016 | 4.555 | 2.041 | 402 | 100 |
| UPSI | 8.860 | 6.362 | 510 | 334 | 193 | 40 |
| GULLAKSUR | 1.055 | 2.647 | 318 | 126 | | |
| TOSKUR | 3.313 | 1.596 | 416 | 398 | 372 | 60 |
| HAVMÚS | 621 | 1.241 | 133 | 59 | | |
| MATHØGGUSLOKKUR | 1.232 | 800 | 453 | 174 | | |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 41 | 275 | 113 | 86 | | |
| KJAFTSV. KONGAFISKUR | 242 | 227 | 82 | 42 | | |
| SVARTKJAFTUR | 455 | 214 | 174 | 84 | | |
| LONGA | 118 | 185 | 52 | 43 | | |
| STÓRI KONGAFISKUR | 29 | 181 | 145 | 81 | | |
| KNURRHANI | 29 | 151 | 57 | 46 | | |
| TUNGA | 22 | 60 | 68 | 61 | | |
| SILVUR MURTUR | 26 | 59 | 110 | 25 | | |
| HAVTASKA | 33 | 57 | 11 | 11 | | |
| SKØTA | * 0 | 34 | 2 | 2 | | |
| KALVI | 26 | 33 | 15 | 15 | | |
| BLÁLONGA | * 0 | 31 | 12 | 12 | | |
| BROSMA | * 0 | 31 | 19 | 14 | | |
| SKRUBBHÁVUR | * 0 | 31 | 2 | 2 | | |
| LÁLLA | 14 | 26 | 17 | 12 | | |
| STEINBITUR | * 0 | 21 | 5 | 5 | | |
| GLASKVOYSA | * 0 | 14 | 9 | 9 | | |
| BÚKSVARTI HÁVUR | 0 | 12 | 11 | 10 | | |
| HVÍTINGUR | 5 | 11 | 2 | 2 | | |
| TRANTKONGAFISKUR | 5 | 8 | 6 | 3 | | |
| GLÝSUFISKUR | 49 | 7 | 21 | 13 | | |
| SVARTFISKUR | * 0 | 7 | 1 | 1 | | |
| SANDSPRØKA | * 0 | 7 | 2 | 2 | | |
| BLÁRIDDARI | 3 | 6 | 14 | 10 | | |
| HVASSHVOYSA | * 0 | 5 | 1 | 1 | | |
| AGNHØEGGUSLOKKUR | 84 | 3 | 2 | 2 | | |
| HVÍTINGSBRÓDIR | 18 | 2 | 3 | 3 | | |
| LÝSINGUR | * 0 | 2 | 2 | 2 | | |
| KIKARAFISKUR | * 0 | 2 | 8 | 8 | | |
| ROSSAMAKRELUR | 79 | 2 | 3 | 3 | | |
| MJÁI PRIKKAFISKUR | * 0 | 0,3 | 1 | 1 | | |
| KJAFTSVARTI HÁVUR | * 0 | 0,2 | 1 | 1 | | |
| SNÍPUÁLLUR | * 0 | 0,03 | 1 | 1 | | |
| LÍTLA BROSMA | 2 | | | | | |
| RÍSNA LANGASPORL | 1 | | | | | |
| **Tilsamans** | **30.331** | **26.366** | **7.357** | **3.745** | **967** | **200** |

***Talva 1:*** *Samlaða veiðan og tal av mátingum/prøvum frá Føroyabankatúrinum 10.-14. september 2004, samanborið við samlaðu veiðuna heysttúrin 2003. Stjørnan (*) vísir til fiskasløg, sum vóru fingin hendan túrin, men ikki árið fyri.*

**Fiskasløg:** Fingin vórðu íalt 39 ymisk fiskasløg á túrinum (*Talva 1*). Hetta eru fleiri fiskasløg enn vit vanliga fáa á Bankanum. Talið av fiskasløgum, sum verða fingin á yvirlitstrolingunum á Bankanum, er vanliga rættiliga støðugt; 33 til 34 ymisk sløg. Á heysti 2003 fingu vit 27 fiskasløg. Í ár fingu vit sostatt 12 fiskasløg fleiri enn í 2003. Fjúrtan fiskasløg vóru fingin hendan túrin, sum ikki vórðu fingin árið fyri (hesi eru víst við eini stjørnu fyri veiðuna í 2003 í *talvu 1*). Tvey fiskasløg, sum vórðu fingin í fjør, men ikki hendan túrin (lítla brosma og rísna langasporl).

**Veiðan:** Samlaða veiðan hendan túrin var 26.366 kg. Hetta er 13 % minni enn fyri einum ári síðani, tá samlaða veiðan var 30.331 kg (*Talva 1*). Á *myndunum 3 –15* verður greitt frá veiðuni av teimum ymisku fiskasløgunum. Á myndunum sæst hvussu nógv varð fingið í hvørjum tovi av hvørjum einstøkum fiskaslagi. Mest verður gjørt burtur úr toski, hýsu og upsa (*Myndirnar 3-14*). Samlaða støddarbýtið av fiskinum fingin á túrinum er víst umframt konditiónsfaktorurin og miðalveiðan árini 1991 og frameftir.

*Mynd 15* vísir veiðuna av teimum fiskasløgum, sum hava minni fíggjarligan týdning fyri føroyska fiskiskapin.

**Toskur:** Tilsamans vóru fingin 1.596 kg av toski á Føroyabanka hendan túrin. Hetta er bert helvtin av tí, sum varð fingið í fjør (*Talva 1*) og einans 23 % av samlaðu toskaveiðuni í 2002, sum var 6.981 kg. Toskur var at fáa yvir tað mesta av Bankanum, undantikið á 5 teimum djúpu støðunum vestanfyri (*Mynd 3*). Mest var fingið í punti 1726, har veiðan var 206 kg. Á *mynd 4* er víst samlaða longdarbýtið av toskinum. Mest var til av toski í longdarbólkinum 68 cm. Hetta er 3 ára gamal toskur. Toskurin á Bankanum er minni nú, enn hann hevur verið. Miðallongdin hendan túrin var 70 cm. Í fjør var miðallongdin 72 cm meðan hon í 2002 var 79 cm. Hetta er nakað minni enn undanfarin ár, tá miðallongdin á toski hevur verið millum 85 og 90 cm. Hendan túrin var einans 4 % av toskinum størri enn 90 cm, meðan 50% av toskinum var minni enn 68 cm. Tað er óivað tað stóra veiðitrýstið á bankanum, sum ger, at toskurin ikki longur hevur møguleika at vaksa seg stóran.

*Mynd 5* vísir miðalkonditiónsfaktorurin á toskinum. Konditiónsfaktorurin sigur okkum hvussu feitur fiskurin er. Miðalkonditiónsfaktorurin hendan túrin var 1,03. Hetta er eitt lítið vet hægri enni í fjør, tá konditiónsfaktorurin var 1,00. Toskurin er sostatt blivin feitari, og minkingin í konditiónsfaktorinum, sum hevur verið síðani ár 2000, tykist nú vaksa afturt. Hetta er tekin um, at fiskurin á Bankanum hevur fingið meira at eta.

Á *mynd 6* er víst miðalveiðan av toski í heyst-yvirlitstrolingunum á Føroyabanka árini 1991 og frameftir. Hendan túrin var miðalveiðan 55 kg pr. fiskitíma. Hetta eru 55 % minni enn árið fyri, tá miðalveiðan var 123 kg pr. fiskitíma.

**Hýsa:** Í alt vórðu fingin 12.016 kg av hýsu (*Talva 1*). Hetta er ein minking upp á 14 % samanborið við árið fyri og einans ein 1/3 av hýsuveiðuni í 2002. Hýsan var at fáa yvir tað mesta av Bankanum, undantikið á 4 teimum djúpu støðunum (*Mynd 7*). Størsta tovið varð fingið í punti 1733 (1.320 kg). Á *mynd 8* er víst longdarbýtið av hýsuni. Miðallongdin á hýsuni var 45 cm, sum er eitt sindur størri enn í fjør, tá hon var 43 cm. 50% av hýsuni er minni enn 49 cm. Á myndini síggjast 3 toppar: ein við 39 cm, ein við 45 cm og ein við 54 cm. Hetta er ávikavist 2, 3 og 4 ára gomul hýsa.

Miðalkonditiónsfaktorurin fyri samlaðu hýsuna var 1,00. Hetta er 3 % hægri enn í fjør (*Mynd 9*). Á *mynd 10* er víst miðalveiða av hýsu fingin á heyst-yvirlitstrolingini síðani 1991. Her sæst, at veiðan øll árini hevur verið í støðugum vøkstri fram til 2002, men eftir hetta er veiðan minkað. Soleiðis var eisini í ár. Miðalveiðan av hýsu hendan túrin var 414 kg pr. fiskitíma, móti 517 kg í 2003 og 1.210 kg í 2002.

**Upsi:** Samlaða veiðan av upsa var 6.362 kg (*Mynd 11*). Hetta er 28 % minni, samanborið við samlaðu upsaveiðuna árið fyri. Størsta tovið var fingið í punti 1711 (2.104 kg). Tað, ið sermerkti upsan var, at hann aftur í ár var smáfallandi. 50 % av upsanum var minni enn 52 cm. Hetta er eitt lítið vet størri enn í 2003, tá 50% av upsanum minni enn 50 cm. Miðallongdin fyri allan upsan var einans 53 cm, sum er 4 og 5 ára gamal (*Mynd 12*). Í 2002 var miðallongdin 60 cm. Miðalkonditiónsfaktorurin á upsanum var 0,99. Hetta er 6% hægri samanborið við árið fyri. Á *mynd 14* er víst miðalveiðan av upsa á heyst-yvirlitstrolingunum á Føroyabanka frá árunum 1991 og frameftir. Hendan túrin var miðalveiðan 219 kg pr. tov. Hetta er 33 % minni enn fyri einum ári síðani.

**Onnur fiskasløg:** Á *mynd 15* er víst veiðan av øðrum fiskasløgum enn toski, hýsu og upsa. Á túrinum fingu vit nakað av brosmu og blálongu. Ikki tær heilt stóru nøgdirnar, men í fjør vórðu hesi fiskasløgini als ikki fingin. Veiðan av mathøgguslokki er minkað úr 1.232 kg niður í 800 kg. Tað sama er galdandi fyri agnhøgguslokk. Her er veiðan minkað úr 84 kg niður í einans 3 kg. Knurrhanin er nógv øktur. Ì 2003 fingu vit 29 kg, meðan veiðan hendan túrin var 151 kg.




***Mynd 3***: *Veiða av toski (kg pr. tov) fingin á yvirlitstrolingini á Føroyabanka í tíðarskeiðum 10.-14. september 2004.*




***Mynd 4***: *Samlað longdarbýti av toski fiskaður á yvirlitstrolingini á Føroyabanka í tíðarskeiðinum 10.-14. september 2004.*




***Mynd 5***: *Miðalkonditiónsfaktor (vekt/longd$^3$) hjá toski á heyst-yvirlitstrolingini á Føroyabanka árini 1992-2004.*




***Mynd 6***: *Miðalveiðan av toski (kg/tíma) á heyst-yvirlitstrolingini á Føroyabanka árini 1991-2004.*




*Mynd 7*: *Veiða av hýsu (kg pr. tov) fingin á yvirlitstrolingini á Føroyabanka í tíðarskeiðinum 10.-14. september 2004.*




***Mynd 8***: *Samlað longdarbýti av hýsu fiskað á yvirlitstrolingini á Føroyabanka í tíðarskeiðinum 10.-14. september 2003.*




***Mynd 9***: *Miðalkonditiónsfaktor (vekt/longd$^3$) hjá hýsu á heyst-yvirlitstrolingini á Føroyabanka árini 1996-2004.*




***Mynd 10***: *Miðalveiðan av hýsu (kg/tíma) á heyst-yvirlitstrolingini á Føroyabanka árini 1991–2003.*




***Mynd 11***: *Veiða av upsa (kg pr. tov) fingin á yvirlitstrolingini á Føroyabanka í tíðarskeiðinum 10.-14. september 2004.*




***Mynd 12***: *Samlað longdarbýti av upsa fiskaður á yvirlitstrolingini á Føroyabanka í tíðarskeiðinum 10.-14. september 2004.*




***Mynd 13***: *Miðal konditiónsfaktor (vekt/longd*$^3$*) hjá upsa á heyst-yvirlitstrolingini á Føroyabanka árini 1996 til 2004*




***Mynd 14***: *Miðalveiðan av upsa (kg/tíma) á heyst-yvirlitstrolingini á Føroyabanka árini 1991-2003.*

***Mynd 15**: Veiða (kg pr. tov) av øðrum fiskasløgum enn toski, hýsu og upsa, fiskaði á yvirlitstrolingini á Føroyabanka í tíðarskeiðinum 10.-14. september 2004.*




Knurrhani
0 0
4.3 0
0 0 0 0
0 0.4 0 1.8 19.8 0
5.9 0 113.2
5.2 0 0 0
0 0
0 0
0.9
0
0 0


Gulllaksur
129.5 1
0 1,002.7
2.9 0 0 25.8
77.3 0 0 0 0 0
1.4 0 0
0 0 0 0
24.6 0
0 87.2
36.2
7.4
823.2 427.5


Havtaska
0 0
0 0
0 0 0 0
0 0 0 0 2 0
18.8 3 1.5
0 7.9 0 0
0 0
0 17
4.8
0
0 2.4


Skøta
0 0
0 0
0 0 0 0
0 0 0 0 0 0
0 0 0
0 0 0 0
0 0
0 0
0
34.1
0 0


Lýsingu
0 0
0 0
0 0 0 0
0 0 0 0 0 0
0 0 0
0 0 0 0
0 0
0 0
0
34.1
0 0


Rossamakrelur
1.8 0
0 0
0 0 0 0
0 0 0 0 0 0
0 0 0
0 0 0 0
0 0
0 0
0
0
0 0


Mathøgguslokkur
0 0
0.1 64.6
0 99.7 149.6 101.4
0 5.8 135.9 15 44 16.4
41.9 20 55.1
6.8 20.5 0 1
0 21.1
0.6 0
0
0
0 0


Agnøgguslokku
0 0
1.1 0
0 0 0 0
1.5 0 0 0 0 0
0 0 0
0 0 0 0
0 0
0 0
0
0
0 0


Havmús
168.4 84.2
0 0
58.6 0 0 0
157.9 0 0 0 0 0
0 0 0
6.3 0 0 0
106.7 0
0 125.8
158.8
13.1
18.9 342.5


Kjafrsv. hávur
0 0
0 0
0 0 0 0
0.2 0 0 0 0 0
0 0 0
0 0 0 0
0 0
0 0
0
0
0 0


Búksv. hávur
0 0
0 0
6.8 0 0 0
0 0 0 0 0 0
0 0 0
0 0 0 0
1.9 0
0 0
3
0
0 0


Skrubbhávur
0 0
0 0
30.8 0 0 0
0 0 0 0 0 0
0 0 0
0 0 0 0
0 0
0 0
0
0
0 0


Lítli kongafiskur
0 0
5.9 8.4
0 0 1.2 16.7
0 0 1.6 1 0 13
14.4 4.6 4.3
13.8 0 0 2.8
0 5.4
7.4 34.8
0
27
113.1 0


Trant kongafiskur
0 0
0 0
5.2 0 0 0
0 0 0 0 0 0
0 0 0
0 0 0 0
2.4 0
0 0
0
0
0 0


Stóri kongafiskur
3.7 4.4
0 0
0 0 0 0
1.4 0 0 0 0 19.7
0 0 15.5
0 0 0 0
0 0
0 5.9
5.9
46.2
0 78.1


Kjaftsv. kongafiskur
0 0
0 0
0 0 0 0
0 0 0 0 0 0
0 0 0
0 0 0 0
7.3 0
0 0
0
0
0 0


Mjái prikkafiskur
0 0
0 0
0 0 0 0
0 0 0 0 0 0
0 0 0
0 0 0 0
0 0
0 0.3
0
0
0 0


Silvurmurtur
3.4 0.1
0 0
0 0 0 0
6.4 0 0 0 0 0
0 0 0
0 0 0 0
0 0
0 0
0.2
0
0 48.8




























Tórshavn 20. desember 2004, Eyðfinn Magnussen____________________